## Leiðin hjá Olympiska eldinum

Olympiski eldurin skal gjøgnum nógv lond, áðrenn hann er frammi í Kina. Byrjað varð í Athen tann 24. mars, og síðani skal eldurin ferðast kring knøttin. Helst uttan at sløkna…




## Kinverjar í øðini

Kinversk umboð fyri olympisku leikirnar fordøma royndunum at steðga olympiska kyndlinum at vinna vegin fram til Beijing. – Eitt fátal av fólki við tibetanskum sjálvstýri á dagsskránni royndu at forkoma kyndlinum. Vit fordøma harðliga hetta átakið, segði ein kinverskur umboðsmaður eftir hendingarnar í London og París seinastu tveir dagarnar. Altjóða IOC-forsetin, Jacques Rogge, sigur, at hann ber ótta fyri altjóða støðuni og tí, sum hendir í Tibet.

# Olympisk mótmæli gjøg

### So tíðliga sum í 1908 vóru mótmæli ímóti Olympisku Leikunum í London

**OL**
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Olympisku leikirnir vóru á fyrsta sinni hildnir í grikska høvuðstaðnum, Athen, í 1896. Í Athen, og við teir næstu leikirnar í París í 1900 og Saint Louis USA í 1904 varð allur politikkur hildin burtur frá leikunum. Men tá leikirnir skuldu haldast í London í 1908, leyp tann fyrsta olympiska skriðan. Írsku ítróttarfólkini mótmæltu, at Bretland ikki vildi geva Írlandi sjálvstýri, og tey boykottaðu øll Olympisku Leikirnar í 1908. Eitt annað minni mótmæli hendi eisini við setanina, tá flaggberarnir hjá øllum londunum skuldu heilsa Edward 7. kongi Bretlands. Liðið hjá USA sýtti fyri at heilsa Bretlands kongi við at níga við flagginum. »Stars and Stripes skal ikki níga fyri nøkrum jørðiskum kongi!« vóru avgjørdu boðini hjá amerikanska liðleiðaranum. Amerikumenn hava hildið fast við hendan stolta siðin, og verður uttan iva ein endurtøka, tá olympisku leikirnir aftur verða í London í 2012. Politikkur, mótmæli og boykott hava javnan stungið høgvarnar undan hesi farnu 100 árini. Sum olympiski søgufrøðingurin, Tony Bijerk sigur so væl:

- Olympisku leikirnir eru eitt lætt mál fyri boykottum.

Onnur speireka við, at boykott burdi næstan verið skrásett, sum ein olympisk ítróttargrein.

### Fasisman og OL

Olympisku leikirnir í Stokkhólmi í 1912, Antwerpen í 1920, Paris í 1924 og Amsterdam í 1928 blivu ikki so illa fongdir av politikki, men í 1932 stakk fasisman høgvarnar undan. Í 1932 vóru olympisku leikirnir hildnir í Los Angeles í USA í 1932, og tað gav ein hvøkk tá ein av teimum italsku ítróttarfólkunum heilsaði fjøldini við tí fasistisku heilsanini hjá Benito Mussolini á sigurspallinum. Hetta gjørdist bert eitt varskó, um hvat fór at henda í 1936. Tá var Týskland vertur, og leikirnir skuldu haldast í høvuðsstaðnum, Berlin. Týskland fekk vertsskapið tillutað áðrenn Adolf Hitler kom til valdið. Leikirnir í 1936 vóru gjøgnumsúrgaðir av politikki, og nasistarnir druknaðu OL í 1936 við sínari propagandu. Røddir vóru frammi, sum heittu á fólk um at boykotta leikirnar, og summi jødisk ítróttarfólk valdu at boykotta leikirnar í Berlin. Olympiski forsetin í USA, Avery Brundage skar ígjøgnum, og syrgdi fyri, at USA ikki boykottaði leikirnar í Berlin í 1936. Lagnunnar speisemi gjørdist kortini, at mest kenda ítróttarfólkið við leikirnar í 1936 gjørdist hin litti Jesse Owens, sum rann seg til 4 gullmerki. Hitler var í øðini, og rýmdi av leikvøllinum, áðrenn Jesse Owens skuldi hava gullmerki um hálsin.

### Kalda Kríggið

Kalda kríggið legði sína køldu hond yvir leikirnar longu í 1952. Sovjetsamveldið tók lut, men teir sýttu sínum ítróttarfólkum at liggja nátt í Helsinki í Finnlandi, har summarleikirnir vóru hetta árið. Tey lendu um morgunin, tóku lut í sínari ítróttargrein, og so fóru tey yvir um aftur markið, so tey kundu liggja nátt "røttu" megin markið.




*Boðini eru greið. Tibet skal verða frælst, áðrenn nakrar olympiskir leikir verða hildnir*
*Mynd: polfoto/PA*